# Fyrsta brúðarvígslan í Klingruni



*Fyrsta brúðarvígslan í Klingruni hjá Føroya Tele í Hoyvík, f.v.: brúðurin Annbritt Brynjolvsdóttir, Jógvan Zachariassen, samkomuleiðari, og brúðgómurin Alex Jacobsen*

*Mynd: Photo Care*

Leygardagin 30. desember 2006 var fyrsta brúðarvígslan á hildin í Klingruni hjá Føroya Tele í Hoyvík.

Tað vóru Annbritt Brynjolvsdóttir í Hoyvík og Alex Jacobsen úr Klaksvík, sum vórðu vígd av Jógvani Zachariassen, samkomuleiðara í Lívdini í Hoyvík.

Umframt at Jógvan Zachariassen helt eina talu fyri brúðarparinum vóru eisini solo- og felagssangur og fiól- og tvørfloytuspæl.

Umleið 250 fólk vóru komin saman í hølunum, sum vístu seg at vera sera væl egnað til hetta endamál.

Veitslan varð fyri innbodnum í samkomuhúsinum Oasuni í Hoyvík.

# Allan Ellingsgaard í Miðlahúsinum




*Allan Ellingsgaard hevur útgávukonsert í sambandi við fløguna "allan ellingsgaard going Home" í Miðlahúsinum mikukvøldið 3. januar*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Mikukvøldið 3. januar 2007 kl. 20 verður útgávukonsert í Miðlahúsinum í Vágsbotni í sambandi við at leirvíkingurin Allan Ellingsgaard, búsitandi í Norðurírlandi, gevur út fløguna "allan ellingsgaard going Home".

Umframt at Allan Ellingsgaard syngur og spælir klaver, spælir Bjarni Jøkladal bassgittara og John Ellingsgaard kassagittara. Fløgan verður eisini at fáa á útgávukonsertini. Konsertin er ókeypis.

Brot úr fløguni eru at hoyra á heimasíðuni: www.allanellingsgaard.com.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jóhanna Bjørgheim Torp, fødd Dam, ættað úr Tórshavn, búsitandi í Reykjavík**, andaðist 23. des. 92 ára gomul. Jarðarferðin verður í Reykjavík 3. januar.

**Solok Mikkelsen, Sørvágur**, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 30. desember, 85 ára gamal. Kistan fer úr landssjúkrahúskapellinum týskvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju mikudagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Solok kunnu lata Missiónshúsinum í Sørvági eina gávu.

**Magdalena Weihe, ættað úr Mykinesi, búsitandi á Bispebjerg í Keypmannahavn**, andaðist jóladag, 91 ára gomul. Jarðarferðin verdur týsdagin 9. januar kl. 13 úr Grundtvigskirkjuni á Bispebjerg.

**Jóhannes Jul Pólsen**, vanliga nevndur snikkarin á Skála, andaðist nýggjársmorgun á Klaksvíkar sjúkrahúsi, 85 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi mikukvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Skála kirkju hósdagin kl. 13.30. Tey, ið vilja minnast Jóhannus, kunnu lata Eldrasambýlinum á Skála eina gávu; konta í peningastovnum.

**Dagny Hellisdal** fer til gravar úr Vesturkirkjuni hósdagin klokkan 13. Tey, ið ynskja at minnast Dagny, kunna lata eina gávu til giktafelagið; konto í peningastovnunum.

**Hans Debes, Oyri**, andaðist sunnudagin 31, des., 83 ára gamal. Bønarhald verður á Landssjúkrahúskapellinum í dag kl. 16. Jarðarferðin verður úr Norðskála kirkju mikudagin 3. jan kl. 13.


# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður mín, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Martin J. Nielsen**

andaðist og varð jarðaður
Tøkk til Bjarna Bæk, prest, kirkjutænarar og sangarar.
Ein serstøk tøkk til heimarøktina.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávu til Føroyafelag móti krabbameini.

*Fyri tey avvarðandi*
**Ida**

# Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum mintust meg á 85 ára føðingardegnum. Eg ynski tykkum eitt gott nýttár.

**Heilsan**
**Gerda Einarsson**